# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sjúkrahúsverkið enn einaferð

Fíggjarmálaráðið almannakunngjørdi í gjár kanningina av fíggjarviðurskiftum í sjúkrahúsverkinum. Kanningin varð sett í verk, tí ivi varð sáddur um kostnaðin av føroyska sjúkrahúsverkinum. Vit stuðlaðu avgerðini um kanningina, men mæltu samstundis til at fáa til vega ein yvirskipaðan heilsu- og sjúkrahúspolitikk, soleiðis at sjúkrahúsverkið fekst at virka sum best. Vit mæltu politikkarunum til at ásanna, at fakliga og fíggjarliga tilfeingið átti at verða savnað kring Landssjúkrahúsið eins og vit mæltu til at menna Landssjúkrahúsið ístaðin fyri at klikkja niður á henda okkara týdningarmesta heilsustovn. Vit vístu á, at tá landið hevði bygt nýtt Landssjúkrahús fyri fleiri hundrað milliónir, so var tað einasta rætta at tryggja neyðuga fíggjarliga tilfeingið, soleiðis at góðu nýggju karmarnir kundu verða fyltir út við tilsvarandi fakligum førleikum.

Staðfest verður í kanningini, at hóast útreiðslurnar til sjúkrahúsverkið eru øktar munandi seinastu árini, kostar føroyska sjúkrahúsverkið minni enn í øðrum Norðurlondum. Tað er gott at fáa hetta staðfest. Men kanningin staðfestir ikki óvæntað, at tørvur er á neyvari fíggjarstýring fyri at temja vøkstrinum í útreiðslunum. Hesi hyggjuráð eru ein fortreytin fyri mongu áhugaverdu tilmælunum í frágreiðingini. Mælt verður til at útvega sjúkrahúsverkinum nýggj fíggjarstýringaramboð til tess at meta um, hvørt tað fæst mest møguligt fyri pengarnar. Hesi ráð kunnu so í framtíðini tryggja, at samsvar er millum tørv og tilfeingi. Nýggju fíggjaramboðini skulu gera fíggjarstýringina lættari - eisini hjá politikarunum. Teir hava ikki kunnað fylgt við, hvussu pengarnir hava verið brúktir.

Hetta er tað nærmasta frágreiðingin kemur inn á sjúkrahúspolitikk, men hóast orðini ikki eru so mong, so eru tey so mikið meira áhugaverd. Tey staðfesta nevniliga, at politiska eftirlitið og áhugin hava einamest verið at eftirkanna, um fíggjarkarmarnir hava verið hildnir. Politikkarnarnir hava higartil start seg blindar uppá reyðu tølini á botnlinjuni og hava í hesum starblindni gloymt tað, sum er altumráðandi - nevniliga fakliga innihaldið. Ella við øðrum orðum, teir hava ikki megnað at skapa tann neyðuga sjúkrahúspolitikkin.

Frágreiðingin um fíggjarviðurskiftini í sjúkrahúsverkinum er eitt gott høvi hjá ábyrgarfullum politikarum at bøta um hesi viðurskifti. Politikkararnir hava fingið eitt gott amboð og nógv góð hugskot til at fáa sjálvt sjúkrahúsverkið at virka betri reint fyrisitingarliga. Hetta er kanska ikki sjúkrahúspolitikkur, men her eru týðandi viðurskifti staðfest, eitt nú samanberingarnar við onnur sjúkrahúsverk av kostnaðinum, og her eru ítøkilig tilmæli av tekniskum, fyristingarligum slag, sum kunnu mynda góðar fortreytir fyri einum skilagóðum heilsu- og sjúkrahúspolitikki til gangs fyri allar føroyingar. Vit fara í næstum at tríva í ítøkiligu tilmælini.

**Sosialurin**

## Tá filmar og tekniseriur geva barnasinninum ótta



THOMAS J. ASKHAM

Vit hava uppliva hesi mongu seinastu árini, at tað eru komnir nógvir sokallaðir filmar, sum eru ætlaðir børnum, somuleiðis eru komnar tekniseriur, sum eru ætlaðar til børn.

Nógvir av hesum filmum eru ræðandi, at til tíðir knípur tað hjá okkum vaksnu at fyrihalda okkum til tær óhugnaligu verur (figurar) sum seta seg á nethindina hjá barninum.

Vit kenna tað øll somul, munin millum at fáa ein boðskap bert gjøgnum oyra, og so at fáa hann bæði gjøgnum oyra og eygu, myndirnar kunnu festa seg og tær kunnu fylgja tær í langa tíð, myndirnar foresterka mangan boðskapin.

Um tú hugsar um eina ávísa hending, sum gjørdi inntrykk á teg og, sum bleiv borin tær í myndum, ja so hugsi eg, at tú vilt geva mær rætt langt fram, at myndirnar forsterkaðu boðskapin í hendingini.

Vit uppliva eisini nú um stundir at tekniseriur hava ræðandi verur (figurar) sum avgjørt ikki geva tí óspilta barnasinninum eitt gott upplivilsi at blaða í.

Um vit taka teldupølini, so eru tað ein fittur partur av teimum, sum appelera til ráheit, drepan, sparkan, skjótan og annað rátt.

Tað skal vera mær langt frá at skera allar filmar, tekniseriur, telduspøl yvir ein kamb og siga alt er vánaligt og rátt fyri barnasinni, eg eri bara stórliga bangin fyri, at tað er langt ímillum tað, sum ikki gevur barnasinninum ein kvøkk.

Vit mugu bert ásanna, at filmar og telduspøl, eru ting, sum gera nakað við okkum menniskju, boðskapurin í filmum/telduspølum ávirka, tað veri seg gott ella ilt.

Undirhaldsídnaðurin er ein alsamt vaksandi ídnaður, tað er hann í ein stóran mun, setur dagsskránna í mongum familjum í dag, eisini barnafamiljum.

Hetta skal vera alt annað enn ein ábreiðsla á barnafamiljur, ella familjur yvirhøvur, nei hetta er meira ætlað sum ein vinarlig heilsan til barnafamiljur. Kanni filmarnar, bløðini, telduspølini, tað eru tit foreldur, sum skulu verja sinni á barninum, og verja barnið frá at blíva álopi og ávirka av hesum óhugnaligu verunum (figurunum), sum er at finna innan undirhald fyri børn og ung í dag.

**Handilsrekandi**

Er tað onki, sum er eitt mark hjá tykkum handilsrekandi, hvar tit siga at hetta er ov rátt ella hetta er for óhugnaligt fyri eitt barn at síggja?

Ella er tað bert ein kensluleysur heimur, hvar ein ikki hugsar um brúkaran, í hesum føri børnini og tey ungu. Eg eri fullvitandi um, at tit siga, at hatta er tað tey ynskja og hatta er tað ið selist.

Góðu tit handlandi, kunna tit ikki útiláta nógv av hesum ráðu telduspølunum og hesum óhugnaligu verunum (figurunum), sum eru við at innføra barninum ótta.

Eg eri eisini fullvitandi um at interneti er proppa fult av hesum typum av spølum, tað vil tá vera foreldranna ábyrgd at verja barnið. Hesar linjur eru meira ætlaðar sum eitt innarligt upprop til tey handilsfólk, sum innføra hesar vørur, verði kritiskir í tykkara valið av spølum.

**Kringvarp Føroyar**

Nú stundar til jólar og bæði útvarpið og sjónvarpið plaga at gera rættiliga nógv burtur úr jólasendingunum fyri børn.

Til tíðir hava tað verið góðar sendingar, aðrar tíðir hava tær verði meira ivasamar, tá kundi tummilin vent niður, tær sendingarnar vórðu ikki barnavinarligar, her hugsi eg serstakt um sjónvarpið, tað er hatta við at fáa boðskapin ígjøgnum bæði oyru og eygu, lati jólaløturnar í ár blíva eina góða uppliving fyri alla familjuna.

Tað ger onki, um jólahøvuðspersónur verður at finna í leiki ella søgum, hann umboðar frið, gleði og ótti er ikki í honum.

## Íslendskar sendistovur undir føroyskum flaggi



HELGI ABRAHAMSEN

Føroyingum stendur í boði at nýta íslendsku sendistovurnar í Moskva og Geneve. Tað fekk Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, at vita, undir vitjan síni í Íslandi í hesi vikuni. Hetta kunnu vit fegnast um.

Men áðrenn vit taka av tilboðnum, noyðast vit at kanna eftir, hvør føroyski politikkurin er á hesum økinum – og her loypur ketan av.

Fyri sløkum tveimum árum síðani, arbeiddi landsstýrið við at opna eina føroyska sendistovu í Reykjavík. Tá vóru danir so beinasamir at geva okkum sama tilboð, sum íslendingar nú bjóða okkum, men í Føroyum var stór mótstøða ímóti hesum.

Tað mátti ikki henda, at føroyingar fóru at húsast á eini danskari sendistovu, har danska flaggið veittraði uttanfyri. Tað kundi heldur ikki góðtakast, at bæði føroyska og danska flaggið vóru har. Nei har skuldi bara tað føroyska flaggið vera.

Hetta var orsøkin til, at føroyingar ikki tóku av danska tilboðnum í Reykjavík.

Tað er sjálvsagt vakurt gjørt av íslendingum at bjóða okkum innivist á teirra sendistovum, og sjálvandi eigur Jørgen Niclasen at takka teimum fyri tað. Men eg eri bangin fyri, at vit kunnu ikki taka av tilboðnum, tí vit kunnu ikki krevja, at íslendsku sendistovurnar í Moskva og Geneve, skulu flagga við føroyskum- og bara føroyskum flaggi.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.